**Álit**

**í**

**ungdómstingsmáli nr. 6/2010: Uppskot til samtyktar um ungdómshús**

Vágs skúli hevur lagt málið fram tann 8. februar 2010, og eftir 1. viðgerð er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. februar 2010.

**Meirlutin** (Høgni Olsen, Andreas Samuelsen, Rói Hansen, Amanda Jensen, Vónbjørt Johannesen, Karin Simona Klein, Marcus Clementsen, Arnina Kjærbo og Laila Midjord) heldur, at hóast tað er av stórum týdningi, at ungdómurin hevur eitt stað at koma saman í í frítíðini, so heldur nevndin tað ikki vera uppgávan hjá Løgtinginum at áleggja kommununum at seta á stovn eitt ungdómshús.

Meirilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja tað

**Minnilutin** (Bjarta Hergeirsdóttir, Sára S. Debess og Fríði Dam) er samdur við merilutanum um, at tað er av stórum týdningi, at ungdómurin hevur eitt stað at koma saman í í frítíðini. Minnilutin heldur, at tað er ábyrgdin hjá kommununum at tryggja, at tey ungu eisini hava møguleikar at koma saman í frítíðini, soleiðis at tey ikki í bólkum reika runt í gøtunum uttan nakað skilagott at taka sær til.

Minnilutin heldur, at um kommunurnar ikki taka teirra ábyrgd í nóg stórum álvara, so má Løgtingið áleggja teimum tað.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtingið til at samtykkja tað.

**Fíggjarnevndin 8. febuar 2010**

| | | |
|---|---|---|
| Høgni Olsen<br>formaður | Amanda Jensen | Fríði Dam |
| Vónbjørt Johannesen | Rói Hansen | Karin Simona Klein |
| Sára S. Debess | Bjarta Hergeirsdóttir | Marcus Clementsen |
| Arnina Kjærbo | Andreas Samuelsen | Laila Midjord |